## Blackpool fekk av at vita

Claus Bech Jørgensen og liðfelagararnir fingu av álvara armarnar niður aftur, eftir fleiri góð úrslit um ársskiftið. Leygardagin spældi Blackpool ímóti einum av fremstu liðunum í næstbestu ensku deildini Charlton, og Blackpool tapti heili 4-1. Claus Bech Jørgensen var á vøllinum frá byrjan, men hann var annar av spælarunum hjá Blackpool, sum varð tikin út eftir ein tíma, tá ið Blackpool-venjarin royndi at venda gongdini. Tað hjálpti ikki.



## Skaddur á venjaraskeiði

Gambiski spælarin Njogu Demba-Nyren hevur gjørt vart við seg á heldur keðiligan hátt í Esbjerg. Hann var eina viku ov seinur til venjingina í felagnum eftir ársskiftið, og tí er hann revsaður við eyka venjing. Um vikuskiftið var hann millum annað við venjing í sambandi við eitt venjaraskeið í Esbjerg, men hann noyddist at gevast, tí hann fekk ein snudd í fótin.

Ísrael-Føroyar 31-21 (17-11)

# Slitnir spælarar taptu við 10

**Føroyska landsliðið hjá monnum tapti eisini seinasta dystin á hesum sinni, og landsliðsvenjarin fer í næstum, saman við hjálparvenjaranum, at evaluera hesa kappingina**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*



*Dia Midjord, landsliðsvenjari fer í næstum, saman við hjálparavenjaranum, at skriva viðmæli til HSF, hvat hann heldur er komið burturúr júst lidnu HM undankappingini*

Føroyska landsliðið er komið heim av hondbóltsferð í Ísrael, og har skuldi tað vísa seg at Ísrael vóru okkum ov sterkir. - Vit merktu rættuliga at tað var fjórði dystur innan fáir dagar, og sjálvt um Ísrael vóru betur enn okkara, áttu vit at megnað at fingið eitt betur úrslit, høvdu vit verið hepnari, og verið meira klárir frá dystarbyrjan. Høvdu tekniski feilirnar ikki verið so nógvir heldur, hevði tað hjálpt munandi, sigur Dia Midjord, landsliðsvenjari.

### Tungir og troyttir

Okkara spælarar virkaði tungir, og vóru vit meira klárir, hevði munurin kanska bert verið eitt ella tvey mál.

Høvuðstrupuleikin er, at vit hava ikki royndirnar á hesum støði, og tað ger at vit eru ov seinir reint motoriskt. Vit brúka meira yvirkroppin, heldur enn at nýta beinini. Tí gerast vit ov seinir.

### Framtíðin

- Í næstum fara eg og hjálparvenjarin at seta okkum niður at finna tað góða, tað ringa, og koma við viðmæli til Hondbóltsambandið (HSF), og haðani verður so ein fundur, einaferð seinni, hvat teir ynskja, og um hvør skal fremja teirra ætlanir út í verkið, sigur landsliðsvenjarin, Dia Midjord.

# 20-ára gamal landsliðsvenjari

**Nýggjur føroyskur landsliðsvenjari í borðtennis er settur, og hesin er bert 20 ára gamal, og kemur úr Noregi og eitur Ole-Christian Stenshorne. Venjarin er kendur í norskum borðtennis, og kemur at búgva á Tvøroyri**

BORÐTENNIS
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tað var fyrr í ár, at spælarin frá Eiker Bordtennisklubb sá eina lýsing á einari danskari bordtennisheimasíðu.

- Har søktu teir eftir einum landsliðsvenjara í Føroyum, og tað sá spennandi út, sigurr Ole-Christian Stenshorne. Eftir nakrar rundur via mail og telefon var arbeiðið hansara.

- I Føroyum eru tað seks borðtennisfeløg, og tann størsti hevur millum 50 og 60 limir. Eg skal búgva á Tvøroyri, heldur Ole Christian fram.

### 10 000 krónur um mánaðin

Hann er væl nøgdur við avtaluna við føroyska borðtennis sambandið (BTSF), sum sikrar honum frítt búpláss, streym og internet. Harafturat fær hann gott og væl 10.000 krónur um mánaðin.

- Hetta arbeiðið kom sum býlagt. Eg eri júst liðugur við hernaðartænastu mína og stóð uttan nakað arbeiði, sigur Stenshorne, ið fær sítt kærasta ítriv til arbeiði.

- Málið eigur ikki at gerast nøkur forðing heldur, tí tit skilja danskt og tað líkist nógv norskum.

### Fantastisk náttúra

Ole Christian, sum hevur tvey fimtapláss frá Norgesmeistaraheitinum sum sínar bestu plaseringar, gleðir seg til at smakka tvøst og seyð og nógv borðtennis.

- Føroyar eru jú ikki kendar fyri sítt hektiska náttalív, so tað blívur nokk góð tíð til at koma at kenna teirru fantastisku náttúruna í staðin, sigur feskasti landsliðsvenjarin at enda.



*Ole Christian Stenshorne, nýggjur landsliðsvenjari í borðtennis*

# Patriots og Packers í finaluna

**New England Patriots gjørdust sum væntað ov stinnir fyri Jacksonville Jaguars, meðan Seattle Seahawks framvegis ikki hava vunnið á útivølli undir Mike Holmgren.**

Tvær semifinalur í American Football vórðu leiktar í gjárkvøldið og í nátt. Talan var um aðra semifinaluna í AFC, New England Patriots móti Jacksonville Jaguars og aðra semifinaluna í NFC, Green Bay Packers móti Seattle Seahawks.

Roknað var við, at Patriots fóru ikki at snáva móti Jaguars, og hetta vísti seg eisini so, hóast støðan í hálvleikinum var 14-14. Quarterback Tom Brady vísti stórspæl, og so kundi New England Patriots leika seg í AFC finaluna við einum sigri upp á 31-20.

Hinvegin varð roknað við einum eitt sindur meiri spennandi dysti millum Green Bay Packers og Seattle Seahawks, men hóast dysturin sum so var rættiliga javnur, so bleiv Packers við at draga frá. Hetta serliga tí teir skoraðu touch-downs, meðan Seahawks mátti taka til takkar við fieldgoals.

Í hálvleikinum vóru Seahawks so nær sum 17-21, men í seinna hálvleiki raplaði hjá liðnum hjá Paul Allen og Packres vunnu til endans lættliga 42-20 og spældu seg harvið í finaluna í NFC.

Í kvøld leika Indianapolis Colts og San Diego Chargers um rættin at møta Patriots í AFC finaluni, meðan Dallas Cowboys taka ímóti New York Giants fyri at finna út av, hvør teirra skal møta Green Bay Packers í NFC finaluni.

Finaluvinnararnir hittast í stóru finaluni, The Super Bowl.